*Primus-motorurin aftanfyri Sørvágs Country & Bluesfestival:*

# EG HAVI FINGIÐ ALS - MEN EG ERI IKKI STÚRIN

– Eg veit, at við sjúkuni ALS er tað bara ein vegur. Mítt motto er, at eg skal liva so leingi, sum eg livi, men eg havi eisini fyrireikað mína jarðarferð, sigur 76 ára gamla, Thordis Skaalum í Sørvági

VILMUND JACOBSEN

Tað er 76 ára gamla, Thordis Skaalum í Sørvági, sum hevur ættarbond í Miðvági, ið eigur hugskotið og síðan 2012 hevur verið primusmotorur aftanfyri Sørvágs Country & Bluesfestival.

– Hugskotið kom ein góðan dag, tá ein rúgva av motorsúkkum vóru her vesturi. Eg hevði vindeygað opið og hoyrdi brummuni frá motorunum. Eg helt hetta vera hugtakandi, og eg fór at hugsa tankan, um tað ikki hevði riggað at havt ein countryfestival her vesturi.

Hon vísir á, at sum miðvingur, men gift í Sørvági, hugsaði hon, at kanska kundi ein slíkur festivalur verið í Miðvági.

– Men, so kom eg at hugsa um hetta fantastiska økið, sum vit hava á Dungasandi, og eg sá fyri mær, at vit eisini kundu havt eina countrygøtu her, meðan tiltakið var.

Í dag – fleiri ár seinni – heldur hon, at tónleikurin er eitt, men umhvørvið, sum skapt verður á countryfestivalinum, er so fantastiska hugnaligt.

– Soleiðis haldi eg, at virðið í samlaða tiltakinum deilir seg í tvey, har country-tónleikurin er eitt og hugnaliga umhvørvið við Dungasandi, countrygøtuni og økinum á Stakka er eitt annað.

## Elskar countrytónleik

Thordis Skaalum viðgongur, at heilt síðan hon var smágenta, hevur hon elskað countrytónleik, og hon minnist seg eisini sum smágentu dansa country við einum kustaskafti á gólvinum. Tá var hon kanska eini 6-7 ára gomul, og hon kendi longu tá fleiri country-sangir.

> **Eg havi fyrireikað meg til at fara úr hesum heimi, og eg havi fest á blað, hvussu hetta skal verða**

Sum árini gingu, og ein av beiggjum hennara sigldi út, plagdi hesin at koma heim við country-tónleiki, og honum dámdi eisini væl tónleikin.

– Heima høvdu vit eina grammofon, sum vit róptu tað tá, eg her plagdu vit mangan at spæla contry-tónleik, sigur hon.

Henda dagin, hon sá allar motorsúkklurnar í Vágum og hoyrdi motorljóðini, fór hon út at koyra og hitti nakrar av koyrarunum.

– Eg kendi eisini onkran teirra, tí onkur úr Vágum var við. Tá bar eg mínar tankar fram um ein countryfestival og teir, eg tosaði við henda dagin, hildu hetta vera eitt gott hugskot.

Hon vísir á, at tá hon nevndi hugskotið í bygdini, var tað eitt sindur ymiskt, hvussu undirtøkan var. Onkur helt hugskotið vera gott, meðan onnur kanska søgdu: "... nei, ikki country, ha?"

– Tað vóru fleiri, sum hjálptu mær í gongd við tiltakinum. Ein sera góður stuðul var Maria Samson, og mín dyggasti stuðul øll árini hevur verið Allan Samuelsen, sum hevur gjørt eitt fantastiska stórt arbeiði og hevur tikið sær av øllum tónleikinum. Hann eigur sín stóra lut í, at tiltakið er blivið til tað, sum tað er, sigur Thordis Skaalum.

Hon er eisini takksom fyri alla hjálp og allar tær hendur, sum hava tikið tøk í sambandi við tiltakið, sum – uttan samanbering – er ársins tiltak í Vágum.

Nú Sørvágs Country & Bluesfestivalur enn einaferð hevur verið í Søvági, hevur primus-moturin eisini fingið tann heiður, hon hevur uppborið.

Í hugnaligu stovuni hjá henni í Sørvági henda dagin, vit stukku inn á gólvið, hongur heiðurs-og takkarbræv, sum nevndin aftanfyri tiltakið handaði henni á festivalinum hesaferð.

Í stovuni saman við okkum, nú vit skifta orð við Thordis Skaalum, er esini 15 ára gamlli ommusonur hennara, Tórolvur Skaalum, og hann heldur eisini, at festivalurin er eitt fantastiskt tiltak.

Sjálv sigur Thordis, at eitt, sum hon stúrdi eitt sindur fyri, tá hon setti sær fyri at hava ein countryfestival í Sørvági, var, um tað nú bara fóru










> **Eg havi fingið staðfest álvarsligu sjúkuna, ALS, og í mínum arbeiði í røktini veit eg, hvat tað er**

at vera tilkomin og eldri fólk, sum fóru at savnast við tiltakið.

– Men, vit hava sæð nakað annað, tí vit siggja bæði ung, tilkomin og eldri á Dungasandi hesar dagar, meðan tiltakið er, og tað fegnist eg nógv um. Eg eri bæði glað og errin av, at tiltakið er vorðið so stórt, sum tað nú er blivið, sigur hon.

## Heilsan farin at bila

Tey, sum kenna Thordis Skaalum - og tey eru mong – vita eisini, at heilsan hjá henni er farin at bila, og nú Sørvágs Country & Bluesfestivalur aftur var í Sørvági, noyddist hon við at sita við vindeygað og hyggja niður yvir stóru fjøldina av fólki.

Men, hesar dagarnar hevði hon eisini nógv fólk á gátt.

– Eg búgvi beint niðanfyri økið á Stakka, og eg siggj niðan á stationera pallin úr fleiri vindeygum. Sera hugnaliga økið á Stakka og pallurin standa næstan í túninum hjá mær.

Thordis sigur, at hon hevur fingið staðfest álvarsligu sjúkuna, ALS, og hon veit, hvat tað er, tí í sínum mongu árum í røktini hevur hon verið um ikki færri enn trý fólk, sum høvdu ALS.

– Tá segði eg við meg sjálva, at bara eg ikki fái ALS, sigur hon álvarsom henda dagin, vit hitta hana í Sørvági.

Hon sigur, at tað eru eini tvey ár síðan, at tað fór at bila við heilsuni, og seinni hevur hon fingið staðfest álvarsligu sjúkuna.

– Eg veit ikki, um eg upplivi ein nýggjan festival í Sørvági, tí eg havi tað ikki gott. Eg fái ikki flutt meg, og eg noyðist at sova her í stovuni hjá mær.

Thordis hevur altíð verið sera virkin, og tað var tann tíð, tá hon hevði fleiri arbeiðir í senn.

– Eg var í røktini, og eg hevði fótarøkt. Eg arbeiddi eisini í handli, og eg sat í kommunustýrinum í fleiri ár – ja, eg kláraði alt, meðan heilsan var góð.

Nú er alt broytt.

– Eg havi fyrireikað meg til at fara úr hesum heimi, og eg havi fest á blað, hvussu hetta skal verða. Sangirnar havi eg valt, og eg havi eisini sagt, at tað skulu bara verða kvinnur, sum skulu syngja við jarðarferðina.

Thordis Skaalum sigur, at við sjúkuni ALS veit hon, at tað er bara ein vegur.

– Mítt motto er, at eg skal liva so leingi, sum eg livi, og í dag fái eg míni nærmastu at leiða meg til onkur tiltøk, sum eru.

Primusmotorurin aftanfyri Sørvágs Country & Bluesfestival endar við hesum orðum:

– Í mínum arbeiði havi eg sitið yvir nógvum doyggjandi fólkum, og eg veit, at tey allar flestu, sum fara, sovna burtur stillisliga, og vanliga eru doyggjandi ikki óttafull. Eg havi upplivað so nógv í mínum arbeiði, og nú tað gjørdist mín lagna at gerast sjúk av ALS, er eg ikki óttafull, slett ikki, sigur Thordis Skaalum, sum tó vónar at sleppa at uppliva onkran countryfestival aftrat í Sørvági.